VINNUSÍÐURNAR

# Leif Mohr letur upp el heilsølu í Eysturoy

**Vinnulívið í Eysturoy hevur leingi keypt nógv el-tilfar frá heilsøluni hjá Leif Mohr og nú verður nýggj deild latin upp á Kambsdali**

*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Partafelagið Leif Mohr, tað vil siga heilsølan við el tilfari, er í ferð við at lata upp nýggja Eysturoyar deild, upplýsir leiðslan á fyritøkuni. Felagið skrivaði leigusáttmála við JT Electric á Kambsdali tann 3. juni og flytir sum skilst inn um hálvan juni.

»Jú, t'er rætt at vit flyta inn í hølir hjá JT Electric,« váttaði Hjalmar Jacobsen, fíggjarstjóri hjá Leif Mohr. »Vit hava fleiri ferðir tosað um at opna eina deild har fyri at gera tað lættari fyri eysturoyingar at skjótt fáa fatur á brúks tilfari og øðrum til el arbeiði.«

Spurdur um stigið at opna deild í Eysturoy hevur nakað við Norðoyatunnilin at gera, vildi Hjalmar Jacobsen ikki svara beinleiðis játtandi.

»Norðoyatunnilin ger sjálvandi ikki umráðið minni áhugavert, men hann er ikki sum so orsøk til avgerðina. Hinvegin eru í Eysturoy fleiri stórir el innleggjarar umframt eitt stórt vinnulív við einum rættiliga stórum tørvi á el tilfari.«

Hjalmar Jacobsen legði dent á at leigusáttmálin ikki skal skiljast sum meira enn ein leigusáttmáli.

»Hetta snýr seg als ikki um nakra alliansu millum okkum og JT Electric… Hetta er eitt vanligt leigumál millum tveir sínámillum neutralar partar. Vit halda fram at tæna øllum el-innleggjarum og vinnulívinum yvirhøvur…«

# Arbeiði á fiskavirkjum minkar í stórum

**Arbeiðsgevarafelagið er minni bjartskygd enn búskaparfrøðingar Landsstýrisins, og órógvast av støðuni í fiskivinnuni á landi og alivinnuni nú virksemið á virkjunum av álvara er minkað**

FLAKAVINNA
*Føroya Arbeiðsgevarafelag*
*industry@industry.fo*

Útlitini í útflutningsvinnuni samsvara ikki við metingarnar hjá landsstýrinum, meinar Vinnuhúsið. Fíggjarmálaráðið metti um mánaðarskiftið at afturgongdin í búskapinum var við at steðga, men samstundis staðfesta tøl frá fiskavirkjunum at útgjaldið frá Fiskavirkisskipanini er dupult so stórt fyrstu 4 mánaðarnar í ár í mun til í fjør.

Í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina segði Bárður Nielsen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, at tær nýggjastu metingarnar hjá búskaparfrøðingunum í Fíggjarmálaráðnum siga at nú er afturgongdin í búskapinum við at steðga. »Metingarnar vísa at nú sær heldur frægari út aftur. Metingarnar vísa at næsta ár fara inntøkurnar hjá landskassanum enntá at kvinka eitt lítið sindur uppeftir aftur,« segði landsstýrismaðurin sambært Sosialin 23. apríl.

Hinvegin staðfesti Arbeiðsgevarafelagið á aðalfundi sínum 3. mai at umframt stóru afturgongdina í alivinnuni, eru fiskavirkjuni eisini komin í trupulleikar. Tað er sera trupult at fáa framleiðsluna at kasta nakað av sær, og tí velja virkir at koyra við lægri blussi, ella at legga stilt ávísar tíðir.

At sjón gongur fyri søgn sæst við at hyggja at útgjøldunum frá Fiskavirkisskipanini. Henda skipan rindar starvsfólki á fiskavirkjum lønarendurgjald, um einki arbeiði er á virkinum undir einum tíðarskeiði. Ein meting út frá tølum frá fleiri av fiskavirkjunum vísir at útgjaldið úr Fiskavirkisskipanini er dupult so stórt teir fýra fyrstu mánaðarnar í ár sum í fjør. Upplýsingar frá ALS vísa at talið av móttakarum av stuðli úr Fiskavirkisskipanini í mars í ár var gott 600, móti umleið 200 seinastu 3 árini.

Í alivinnuni verða starvsfólk uppsøgd so hvørt so fiskurin verður tikin, og stórt sæð einki av smolti verður sett út. Í alivinnuni eru trupuleikarnir lágir prísir og sjúkutrupuleikar. Hjá fiskavirkjunum eru trupuleikarnir at vaksandi útreiðslur gera tað tvørligt at fáa framleiðsluna lønsama. Hetta kann sigast at vera partvíst sjálvgjørt um vit hyggja at lønarhækkingunum her heima, sum hava verið nógv størri enn hjá kappingarneytum okkara. Men eisini viðurskifti sum vit ikki kunnu stýra eru eiga sín lut. Kappingin frá láglønarlondum er munandi harðnað, og valuta viðurskiftir hava eisini verið ímóti okkum.

Tað er ikki bara útflutningsvinnan sum merkir aftirgongd. Ringvirkningarnir av støðuni í alivinnuni og á fiskavirkjunum merkjast av álvara innan tær vinnugreinar sum veita tænastur til høvuðsvinnurnar, sigur Arbeiðsgevarafelagið, sum samstundis sigur seg hava ilt við at skilja hvat tær bjørtskygdu metingarnar hjá búskaparfrøðingunum í Landsstýrinum eru grundaðar á.

RUNAVÍKAR HAVN
www.runavik.fo



Runavíkar Havn veitir tænastur innan fiskivinnu, umframt oljuvinnu,farmaflutning og ferðavinnu

RUNAVÍKAR HAVN · TEL 44 70 15 · FARTEL 22 51 14 · FAX 44 89 20 · VHF KANAL 16 · WWW.RUNAVIK.FO



VINNUSÍÐURNAR

# Flakamaskina til reinskering vekir ans



*Arne Carlsen, tekniskur leiðari og partnari í FJM, sigur at áhugin fyri "IQ 4000" er stórur.*

*Foto: Maria Olsen / PRnewsMedia.com*

**Føroysk-íslendska »IQ 4000« er ein skipan til automatiseraða reinskering av flaki sum hevur vakt altjóða ans: skal kunna arbeiða fyri 8-10 fólk, optimera gagnnýtslu av fiski og spara pening og tíð í fiskaframleiðslu**

ÍDNAÐUR
*Búi Tyril*
*tyril@PRnewsMedia.com*

Rustfrítt stál framleiðslu virkið FJM í Runavík er í samstarvi við ta íslendsku fyritøkuna Skaginn á veg við einari nýggjari flakamaskinu sum hevur vakt altjóða ans. "IQ 4000" byggir á kombineraða føroyska og íslendska vitan innan fiskivinnu, maskintøkni og teldufrøði; hugtakið automatiserar reinskeringina av fiskaflaki og sparir arbeiðsorku í framleiðsluni, umframt at leingja feskleikan í flaki og tryggja at reinskeringin gagnnýtir fiskin sum mest. Ein prototypa av IQ 4000 verður í løtuni testað og sambært FJM er ætlanin í næsta ár at leggja út á marknaðin fyri flakavirkir í vón um góða undirtøku.

Longu nú er stórur áhugi fyri IQ 4000, skilst. Ein breiður áhugi kom eitt nú til sjóndar á European Seafood Exposition í Brússel herfyri; tað sigst at ein kendur stjóri helt tá fyri at »hatta var einasta veruliga nýggjheit á messuni« og eisini vakti básurin hjá Skaginn og FJM ans millum tungar týskarar í maskinídnaðinum.

»Tað tykist greitt at produktið hevur áhuga millum mong,« segði Arne Carlsen, parteigari í FJM og tekniskur leiðari. »Nú skulu vit bara síggja til at testa maskinuna tað sum eftir er av árinum, og samstundis gera klárt til at koma út á marknaðin við henni.«

Sambært FJM skal IQ 4000 roynast á einum íslendskum flakavirki frá 1. januar. Hugtakið byggir á at fiskaflak sum fyrst verða køld niður móti frostmarkinum, verða førd við transportbandi til høvuðseindina ið avmyndar flakið og skapar arbeiðsdata íroknað identifikatión av teimum ymisku økjunum fyri kílabein, loins við meira, fyri síðani at skera flakið eftir hesum og annars teimum data sum brúkarin frammanundan hevur tastað inn í maskinuna.

»Reinskeringin verður útførd við datastýrdari vatnstrálu og hendan tøknin er einans møgulig í og við at fiskurin fær ein heilt serligan konsistens orsakað av niðurkølingini,« greiddi Arne Carlsen frá.

»Tað snilda er at skipanin er so sera flexibul… Umframt til at reinskera við kann hon eisini væl brúkast til at analysera flak fyri støddir og proportiónir so væl sum onnur sjónlig viðurskifti, til dømis sandmaðk. Og so bestendur heilin í skipanini av programmvøru ið er løtt at broyta, uppgradera og dagføra, so valmøguleikarnir fyri fjøltáttaðari nýtslu og víðari menning eru stórir.«

Meðan Skaginn hevur ment køliprocess og skerieind, hevur FJM við egnum fólki klárað programmering so væl sum samling og plátuarbeiði. Tøknifrøðin í IQ 4000 minnir um tøknifrøðina aftan fyri ‘fiskakennaran’, eitt projekt hjá FJM, parað við royndirnar hjá íslendingum við einari serligari køliprocess sum gevur fiski longdan feskleika og hækkað søluvirði.

## Satsa uppá menning

Tað tøknifrøðiliga tilfeingið hjá FJM er vaksið nógv í seinastuni. Felagið hevur upprættað eina menningardeild ið skal samansjóva kunningartøknifrøði og ta vitan fyritøkan eigur um mekanik innan fiskaframleiðslu. Harafturat er teldufyritøkan Tera, ið nú heldur til í somu húsum sum FJM, blivin ein alt meira innbygdur partur av virkseminum.

»Vit rokna við at kunningar og samskiftis tøknifrøðin í komandi tíðum fer at vaksa nógv sum partur av virkseminum hjá okkum,« helt Arne Carlsen fram.

Samstarvið við íslendingar kom í lag aftan á at partarnir høvdu lært hvønn annan at kenna í sambandi við arbeiði at installera nýggjar maskinur á Kollafjord Pelagic. Meðan ein annar veitari frammanundan hevði trupulleikar og mátti geva skarvin yvir, eydnaðust installatiónirnar eftir øllum at døma væl, soleiðis at Kollafjord Pelagic endiliga kundi koma í gongd.

»Vit leveraðu ávísar partar meðan Skaginn leveraði aðrar og arbeiðið gekk væl,« segði Arne Carlsen. »Tað slapst illa undan at vit tosaðu saman og vit sóu skjótt at møguleikarnir fyri samstarvi framyvir vóru góðir.«

Alt bendir á at IQ 4000 kann gerast ein sólskins søga í hesum sparitíðum. Flakavirkir eru undir stórum trýsti at rationalisera og lækka kostnaðarstigið fyri at fáa avlop og ein automatiseraður reinskerari sum hvørki krevur yvirtíð ella brýggjar seg um kulda og sum skal arbeiða fyri 8-10 fólk kann neyvan vera annað enn áhugaverdur í samanhanginum. Legg so afturat tað økta søluvirðið í fiskinum sum fæst burtur úr tí serligu kølitøknini sum verður brúkt, og sannlíkindini fyri suksess gerast enn størri. Men, sum Arne Carlsen eisini vísti á: »Tann langi vegurin niðaná kann vera knorklutur…«

Upprunaliga stovnað í 1986, starvast í dag umleið 40 fólk hjá FJM. Felagið hevur specialiserað seg innan rustfrítt stál og tænir fiskivinnuni á landi og sjógvi sum framleiðari av øllum frá flekilinjum til heilar fabrikkir.

## Rói Vang nýggjur stjóri á JT Electric

Tann 1. juni gjørdist Rói Vang nýggjur stjóri hjá el-innleggingarvirkinum JT Electric á Kambsdali. Rói Vang hevur drúgvar royndir bæði hjá JT Electric og í egnum virki; hann hevur fingist við PLC stýringar, tænastu og innstallatiónir fyri virkir á sjógvi og landi.

*BT / PRnewsMedia.com*

## Færri arbeiðstímar hótta danska vælferð

Tað gerst alsamt meira ein samfelagsligur trupulleiki at danir arbeiða minni og minni, siga OECD og Dansk Arbejdsgiverforening. Síðani 1960 eru tímarnir sum ein miðal arbeiðari er til arbeiðis hvørt ár, falnir úr 2.100 tímum til 1500 tímar. Hetta er ein avleiðing av styttri arbeiðsviku og meira frítíð. Hendan munandi lækking upp á 30 prosent sæst aftur í einari nýggjari analysu hjá Velfærdskommissionen, sum varð almannakunngjørd um mánaðarskiftið mai-juni. Avleiðingin av teimum færru arbeiðstímunum er at teir almennu kassarnir eru hungra eftir pengum í og við at hvør skattgjaldarin rindar færri skattakrónir til teir almennu kassarnar, skrivar Dansk Byggeri.

*industri.fo*